# Nýggjur sáttmáli um rakstur av Landsneti

*Um **KT Landsins og Landsnet***

*KT Landsins er deild á Gjaldstovuni, sum hevur til uppgávu at veita almennum stovnum KT tænastur og at samskipa KT á yvirskipaðum stigi.*

*Tænasturnar hjá KT Landsins verða nevndar undir felagsheitunum Landsnet og BSL.*

***Landsnet** tænasturnar fevna um hýsing og rakstur av servarum og netverkum, uppseting og atgongd til grundleggjandi forrit á brúkarateldum og KT support til brúkarar. Í dag eru um 50 stovnar, 2.000 brúkarar og fleiri enn 300 servarar partur av Landsnet tænastuni.*

***BSL** tænasturnar fevna um menning, viðlíkahald, rakstur av BSL skipanini og support til brúkarar.*

*Samskipanin av KT fevnir um ráðgeving í KT spurningum, luttøku í yvirskipaðum og tvørgangandi verkætlanum, standardisering av politikkum og mannagongdum og gerð av yvirskipaðum strategium fyri KT økið hjá landinum.*

*Lesið meiri um KT Landsins og Landsnet á [www.gjaldstovan.fo/kt-landsins](www.gjaldstovan.fo/kt-landsins)*

KT Landsins skal gera nýggjan 3 ára sáttmála um rakstur av Landsneti, og í hesum sambandi verður møguligt hjá áhugaðum veitarum at biðja um undangóðkenning (*prækvalifikatión*), fyri at finna veitara(r) sum kunnu standa fyri rakstrinum næstu 3 árini.

Raksturin av Landsneti verður í dag veittur av tveimum veitarum, og væntandi verður nýggi sáttmálin eisini gjørdur við fleiri enn ein veitara.

Teir veitarar, sum verða undangóðkendir (*prækvalificeraðir*), verða partar av eini samráðingartilgongd, sum fer at varða til mars 2016, tá nýggjur sáttmáli skal undirskrivast. Strembað verður eftir at nýggjur sáttmáli fær virknað frá 1. apríl 2016.

Í stuttum skal veitari, sum ynskir at verða undangóðkendur, lúka hesi krøv. Veitarin skal:

- Kunna bjóða fram ein rakstrardepil í Føroyum, sum uppfyllir krøvini í ISO/IEC 27002
- Kunna bjóða fram eitt rakstrarumhvørvi við nøktandi útgerð
- Skipa sítt virksemi eftir ISO 27001 og 27002 trygdarstandardinum
- Vísa á royndir við rakstri av kundum/skipanum, sum í vavi og kompleksiteti kann sammetast við Landsnet
- Skjalfesta, at starvsfólkini hava neyðugar førleikar at standa fyri rakstri av Landsneti
- Vera ein føroysk fyritøka
- Vera fíggjarliga førur fyri at lyfta uppgávuna

Veitarar, ið hava áhuga í at verða undangóðkendir, kunnu venda sær til Nicolai Balle, deildarstjóra á KT Landsins á [nicolai.balle@gjaldstovan.fo](mailto:nicolai.balle@gjaldstovan.fo), fyri at fáa tilfar útflýggjað. Í tilfarinum eru krøvini útgreinað, og greitt verður nærri frá, hvussu umbønin til undangóðkenningina skal skjalfestast. Freistin at biðja um tilfar til undangóðkenning er 17. februar 2016.

Undangóðkenningartilfarið , har veitarin skal skjalprógva at hann livir upp til ásettu krøvini , skal verða KT Landsins í hendi seinast 26. februar 2016.